# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*




# Jan Müller blaðstjóri í 25 ár



Síða 6

tíðindablaðið sosialurin

Útgevari: p/f sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Politiskur- og fyritaksblaðstjóri: Krisjan Dahl
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen og Jóhann Mortensen
Uppseting: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Argjavegur 26
Postsmoga 76,
3800 Tórshavn
telefon 11820



tíðindablaðið sosialurin

Gylta liðið á Sandi

Blaðstjóraskifti

Enn óvíst um talan er um løg við olju

**Leygardagin 14. februar eru liðin 25 ár síðan Jan Müller tók við sum ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum**

Á forsíðuni á Sosialinum týsdagin 14. februar 1984 er ein tíðindagrein um stjóraskifti á tíðindablaðnum Sosialinum. Tað eru Jan Müller og Krisjan Dahl, sum hava tikið yvir leiðsluna á blaðnum, eftir at Tórfinn Smith, sum var blaðstjóri, hevði sagt seg úr starvi.

Jan varð settur sum blaðstjóri við ábyrgd yvirfyri pressulógini, meðan Krisjan varð settur sum politiskur blaðstjóri og fyrisitingarstjóri. Krisjan andaðist 11. januar 1998, 50 ára gamal.

Hóast Jan hevur verið blaðstjóri á Sosialinum í 25 ár, hevur hann arbeitt á blaðnum í yvir 30 ár. Eftir at hava tikið prógv sum studentur í 1971, læs hann eitt stutt skifti samfelagsfrøði við Keypmannahavnar Universitet og tók síðan prógv á Støðisútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum í 1974, áðrenn hann fór á blaðmannaskúla í Danmark. Hann tók prógv í 1978 og fór eftir tað í starv á Sosialinum.

Jan er kendur sum tann ídni ábygdarblaðstjórin. Hann arbeiðir ótroyttiliga fyri hjartabarninum, Sosialinum, og nú eisini tí nýggja hjartabarninum, Miðlahúsinum. Fyritøkan hevur ment seg nógv hesi árini og er í dag fremsta fjølmiðlahús í landinum við Føroya størsta blað, við útvarpsstøðini Rás2 og portalinum, sum er mest lisna heimasíða av føroyingum heima og uttanlands.

Starvsfelagarnir ynskja Jan hjartaliga tillukku við degnum og mong góð ár afturat!

*-red*

## Føðingar

15. januar fingu Hanna Thomsen og Kim Mørup, Kibæk, Danmark eina dóttur á Herning sjúkrahúsi. Hon var 51 cm long og vigaði 3280 gr.

9. februar fingu Elin Herta Hammer og Jóhan Heini Joensen eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigai 3700 gr.

11. februar fingu Hallfríð og Rúni í Hjøllum, Toftir ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

11. februar fingu Jórun og Jan Andreasen, Klaksvík ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3500 gr.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 16. februar verður Julianna Didriksen í Havn 80 ár. Dagurin verður hildin Pállstovu leygardagin 14. febr. kl. 19.00.

**70 ára føðingardagar**
70 ára føðingardagarnir hjá Gunnvør og Jefri Justinussen, Tórshavn, verða hildnir í Pálsstovu leygardagin 21. februar kl. 18.00. Tey, ið ætla sær at koma, verða vinarliga biðin um at boða frá á tlf. 313003, 213043 ella 272803 í seinasta lagi sunnudagin 15. februar.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 14. februar hava hjúnini Esther og Johan M. Restorff, Tórshavn, gullbrúdleypsdag. Dagurin verður hildin saman við børnum, barnabørnum og systkjum.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 20. februar kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Durita Biskopstø og Victor Andreasen bæði úr Tórshavn. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00. Vit síggjast.

**Prógv**
Harriet á Toftini hevur 6. februar 2009 lokið prógv sum heilsuatstøðingur á SOSU NORD í Hjørring.